**Góðu áhoyrarar,**

Tríggjar bjartar ítróttastjørnur skína bjart á føroyska himmalhválvinum í áttatiárunum. Tær vísa okkum øðrum vegin og gerast fyrimyndir. Bæði heima og úti í heimi floyma heiðursmerkini inn, og ferð eftir ferð seta tær Føroyar á heimskortið.

Eingin onnur ítróttagrein megnar at standa teimum kurl, og framvegis til dagin í dag hevur eingin megna at gjørt teimum brøgdini eftir. At koma úr Føroyum og eftir nøkrum fáum árum at vinna OL- gull, HM-gull og EM-gull, er einki minni enn eitt ótrúligt avrik.

Seinast í áttatiárunum eru tað fá í Føroyum, sum ikki kenna til Katrina Dagbjartsdóttir, Christinu Næs og Tóru við Keldu. Við ótroyttiligum stuðli frá ÍSB bróta tær slóð hesi árini – eru ambassadørar hjá fólki, ið bera brek. Eitt orðatak sigur, at meira tú vilt, meira kanst tú. Hetta var sanniliga galdandi fyri Katrin, Christina og Tóra, ið eru livandi dømi um, at hóast tú ber eitt brek, so er tað ein eingin forðing fyri at vinna seg fram á fremstu rók.

Tað er tíverri ein av lívsins fortreytum, at summi eru meiri skerd enn onnur. Summi eru fødd inn í truplari umstøður enn onnur. Onnur bera brek, sum kunnu tyngja um gerandisdegin. Lívið er ikki líka lætt at liva hjá øllum. Og um vit hyggja at býtinum av mótgongd, sum hvørt einstakt menniskja fer ígjøgnum, so er lívið ofta órættvíst.

Men tað er ikki tað, sum er avgerandi. Tað snýr seg um okkara hugburð. Tað hevur størri týdning, hvussu eitt menniskja ber sína lagnu, enn hvør hendan lagnan í veruleikanum er. Katrin Dagbjartsdóttir, Christina Næs og Tóra við Keldu eru tríggir persónar, sum í áttatiárunum prógva, at við røttum hugburði, kanst tú náa langt.

Fyri okkum menniskju, hevur tað týdning fyri at vera viðurkendur sum persónur. Føroyingar, ið bera brek, hava óivað gjøgnum tíðina ofta kent á sín kropp, at tey ikki verða viðurkend á sama hátt sum onnur. Fordómarnir hava tíverri verið nógvir, og vit

skulu ikki so nógv ár aftur fyri lesa og síggja, at fólk, ið bera brek í Føroyum ikki hava verið mett sum fullførir borgarar.

Í sambandi við hesa røðuna havi eg seinastu dagarnar kagað í nakrar ítróttabøkur frá áttatiárunum fyri uppfríska frálíku úrslitini og brøgdini hjá ÍSB svimjarunum. Eg hvakk við, tá ið eg varnaðist í einari grein miðskeiðis í áttatiárunum varð teirra ítróttagrein rópt fyri "spastikarasvimjing". Vit skulu ikki undirmeta, hvat vald liggur í málinum, og fyri mong hevur hetta heitið óivað verið sárandi og útihýsandi. Tíbetur hevur føroyska samfelagið flutt seg nógv síðan í 80 árunum, tí hesin niðursetandi og stigmatiserandi málburður er tíbetur søga í dag.

Í dag eru 19 ár síðan Sameindu Tjóðir ásettu 3. desember at vera altjóða handikapdag. Hesin dagur verður nýttur kring allan heim at varpa ljós á viðurskiftini hjá teimum, ið bera brek. Hetta er av sonnum ein hátíðardagur, sum hevur stóran týdning – ikki minst í Føroyum.

Ráðið fyri Brekað hevur víst á, at tað er um tíggindi hvør borgari í Føroyum, sum ber brek. Hetta merkir, at 10% av okkara borgarum ikki hava sama møguleika at luttaka og vera virkin í føroyska samfelagnum, sum restin av borgarunum.

Hesar borgarar eiga vit sjálvandi at taka hond um.

Góð tvey ár eru liðin, síðan vit settu í gildi ST sáttmálan um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek. Sáttmálin var eitt stórt framstig og er okkara jarnbrot í stríðnum at fáa jøvn rættindi fyri allar borgarar. Við ST-sáttmálanum er kósin løgd.

Visjónin og okkara avbjóðing er at menna einar Føroyar, ið geva rúmd fyri øllum. Einar Føroyar, har øll kenna seg virðismett og sum tryggjar fólki, ið bera brek, møguleika at arbeiða og virka í samfelagnum sum aðrir borgarar.

Sum landsstýriskvinna kann eg ikki annað enn ásanna, at nakað er á mál fyri røkka hesi visjón. Brekpolitiski hugburðurin, sum liggur í ST sáttmálanum, er stundum ringur at fáa eyga á í verandi skipanum í Føroyum.

Dvølja vit eina løtu yvir hugtakið ”brekpolitiskur hugburður”, so er tað eitt hjartamál hjá mær á hesum øki, at vit gera tað møguligt hjá hvørjum einstaklingi at virka í samfelagnum. Hjálpartól, fyritíðaropensjón og vard størv tryggja ikki í sjálvum sær fólki, ið er bera brek eitt gott og innihaldsríkt lív. Hesi tilboð og tænastur er avgjørt týdningarmikil í gerandisdegnum fyri at kunna klára seg, men tey eru ikki nóg mikið.

Grundhugburðurin má vera, at vit fyri alt í verðini ikki parkera fólk og fasthalda teimum í einum passivum leikluti. Hinvegin skulu vit sum samfelag eggja tryggja borgarum, ið ber brek, javnbjóðis møguleikar til at virka í samfelagnum og gagnnýta sínar førleikar.

Sum landsstýriskvinna ætli eg mær at syrgja fyri, at ST- sáttmálin ikki gerst ein sovipúta við nøkrum flottum yvirlýsingum. Tað verður gjørt við at arbeiða ítøkiliga fyri at seta viðkomandi lóggávu og kunngerðir í gildi. Tað var ein stóru bati, tá ið kunngerðin um atkomu varð sett í gildi, men enn mangla tey stóru tøkini, áðrenn vit í verki kunnu vísa, at allir borgarar í Føroyum verða viðurkendir.

Á sama hátt, sum Katrin Dagbjartsdóttir, Tóra við Keldu og Christina Næs strembaðu høgt og rukku sínum málum, eiga vit sum myndugleiki at berjast fyri, at viðurskiftini hjá fólki við breki gerast betri. Tað skylda vit fólki við breki og tað skylda vit okkum sjálvum.

Við hesum orðum fari eg takka fyri, at eg fekk møguleikan at siga nøkur orð. Vónandi fáa vit øll eina spennandi og mennandi dag.

Takk fyri!

Annika Olsen, landsstýriskvinna í almannamálum